**Uppskot til**

# Reglugerð
# um
# nýtslu av serstøkum sjúkrahúsheilivági

Við heimild í starvsskipan fyri Heilivágsráðið frá 8. februar 2024, og eftir góðkenning frá landsstýriskvinnuni, ásetir Heilivágsráðið hesa reglugerð:

*Allýsingar*

**§ 1.** Landsstýrisfólkið ásetir reglur um starvsskipan fyri Heilivágsráðið.

**§ 2.** Uppgávurnar hjá Heilivágsráðnum eru ásettar í Starvsskipan fyri Heilivágsráðið, galdandi frá 8.februar 2024.

**§ 3.** Játtanin fevnir um heilivág í útflýggjanarbólki BEGR og NBS, samanber § 6, stk. 1, nr. 4 og 5 í kunngerð nr. 124 frá 7. september 2022 um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan av heilivági.

**§ 4.** Í hesi reglugerð er at skilja við:
1) Munandi fíggjarligar avleiðingar: Um upphæddin á heilivágnum er 100.000 kr. ella hægri um árið fyri hvønn sjúklingin ella 300.000 kr. í samlaðum útreiðslum um árið fyri heilivágin.
2) Lækni: Serlækni settur í Sjúkrahúsverkinum.

*Læknaligar ávísingar av heilivági, fevndur av játtanini*

**§ 5.** Lækni kann ávísa heilivág sambært § 3, sum er í nýtslu í Sjúkrahúsverkinum.

**§ 6.** Lækni kann ávísa heilivág sambært § 3, sum ikki er í nýtslu í Sjúkrahúsverkinum, og sum er góðkendur av Medicinrådet í Danmark.
*Stk. 2.* Hevur heilivágurin sambært stk. 1 munandi fíggjarligar avleiðingar við sær, krevst loyvi frá Heilivágsráðnum.
*Stk. 3.* Lækni sendir Heilivágsráðnum umbøn um at loyva ávísingini, sum loyvi krevst til sambært stk. 2.

**§ 7.** Lækni kann í serligum føri ávísa heilivág sambært § 3, sum ikki er í nýtslu í Sjúkrahúsverkinum, og sum ikki er góðkendur av Medicinrådet í Danmark.
*Stk. 2.* Loyvi krevst frá Heilivágsráðnum at ávísa heilivág sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Lækni sendir Heilivágsráðnum umbøn um at loyva ávísingini, sum loyvi krevst til sambært stk. 2.

**§ 8.** Heilivágsráðið kann, eftir góðkenning frá landsstýrisfólkinum, seta í verk bráðfeingis støðg fyri tilgongd av nýggjum sjúklingum til nærri tilskilaðan heilivág.

*Gildiskoma*

**§ 9.** Hendan reglugerð kemur í gildi 8. februar 2024, samstundis fer reglugerð frá 11. september 2018 fyri nýtslu av serstøkum sjúkrahúsheilivági úr gildi.

Heilivágsráðið, 8. februar 2024

**Steinar Eirikstoft**
formaður